


# Oljufeløg skulu hava umboð búsitandi í Føroyum

**Jan Müller**

17.03.2014 - 22:14

Oljan.fo

Mikudagin kemur til 1. viðgerð á løgtingi uppskot frá Johan Dahl, landsstýrismanni í vinnumálum um broyting í løgtingslóg um kolvetnisvirksemi. Hetta snýr seg í høvuðsheitinum um, at loyvishavarar tvs. útlendsk oljufeløg, sum hava leitiloyvi í Føroyum, skulu skráseta deild ella felag og hava umboð búsitandi í Føroyum.

Hetta var eitt krav í upprunaligu kolvetnislóggávuni men datt burtur, tá nýggj vinnulóggáva varð samtykt í 2008. Nú ynskir landsstýrismaðurin so at binda um heilan fingur og seta fram nýggj krøv til oljufeløgini.

Í viðmerkingunum til uppskotið stendur m.a.:

”Endamálið við lógaruppskotinum er at áseta í lógina um kolvetnisvirksemi, at loyvishavarar við loyvum til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum skulu hava deild ella felag í Føroyum og skulu hava umboð, búsitandi í Føroyum.

Tá loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum av fyrstan tíð vórðu latin, var eitt krav, at loyvishavarar skuldu hava deild, skrásetta í Føroyum. Hetta hevði samstundis við sær, at loyvishavararnir vóru umboðaðir av persóni, búsitandi í Føroyum, tí deildir skuldu hava leiðara, ið var búsitandi í Føroyum.

Kravið um at hava deild skrásetta í Føroyum varð ásett í modelloyvum, ið vóru samfeldur partur av løgtingslógum um útbjóðingarumfør.

Eftir at føroyska partafelagslógin varð broytt í 2008, var tað ikki longur eitt krav, at deildir, skrásettar í Føroyum, skuldu hava deildarleiðara, ið er búsettur í Føroyum. Hesin partur av upprunaligu treytunum til loyvishavarar fall tí burtur við hesi broyting.

Av teimum verandi fimm loyvishavarunum eru tveir, ið ikki hava umboð búsitandi í Føroyum. Uppskotna lógarbroytingin er ikki einans viðkomandi fyri hesar, men eisini komandi loyvishavarar.

Vinnumálaráðið er av teirri áskoðan, at tað er skilagott, at loyvishavarar hava persónliga umboðan í Føroyum. Tað er týdningarmikið, at tað er lætt og gott samskifti við allar loyvishavarar, eins og tað er galdandi í leitiskeiðinum, líka so væl sum í seinni skeiðum. Hetta endamál verður best nøktað við persónligari umboðan í Føroyum.

Hóast tað neyvan er møguligt at áleggja feløgum, hvussu ella í hvønn mun tey brúka føroysku umboðanina, er tað ynskiligt, at føroyska umboðanin verður brúkt virkið, tí tað er týdningarmikið, at gott samband er millum føroyskar myndugleikar, føroyska samfelagið sum heild og loyvishavarar.

Heimild er sambært lógunum til ávikavist fyrsta, annað og triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum at krevja deild, skrásetta í Føroyum. Hildið verður tó, at tað er greiðari, at hetta frameftir verður ásett beinleiðis í kolvetnislógini. Hetta m.a. tí, at kolvetnislógin í 2010 varð broytt soleiðis, at tað ikki longur krevst, at útbjóðingarlóg verður samtykt í Løgtinginum, áðrenn loyvi verður latið til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

Grundað á omanfyri standandi verður mælt til, at broyting verður gjørd í kolvetnislógini, har ásett verður, at loyvishavarar skulu hava deild ella felag skrásett í Føroyum, og at teir skulu hava umboð, sum er búsitandi í Føroyum.”

Landsstýrismaðurin vísir annars á, at uppskotið fer ikki at hava fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið ella kommunurnar og lítlar og ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

Hoyring hjá oljufeløgunum og Jarðfeingi

Uppskotið hevur verið til hoyring hjá FOIB og hjá Jarðfeingi.

Í sínum hoyringsskrivi ger FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur, sum umboðar oljufeløgini, ið hava leitiloyvi við Føroyar, greitt, at tað er illa við av ætlanini at broyta oljulóggávuna afturvirkandi. Og metir hetta sum eitt principielt mál. Broytingarnar fara at hava við sær nýggj krøv til feløgini, sum hava nýggjar útreiðslur við sær. Hetta fer at skapa ótrygg viðurskifti, sum kunnu gera, at feløgini ikki longur fara at kenna Føroyar sum eitt trygt stað at gera íløgur í. Í løtuni meta feløgini Føroyar sum eitt trygt og stabilt øki at gera íløgur í. Eisini vísa feløgini á, at tey halda ikki, at tað hava verið trupulleikar við samskiftinum millum Jarðfeingi og feløgini. Og tí er ikki orsøk til at gera broytingar í so máta. FOIB tekur tó fult og heild undir við, at myndugleikar í framtíðar loyvum seta krøv til, at oljufeløg skulu hava skrivstovu í Føroyum. Hetta skal bara ikki vera afturvirkandi.

Jarðfeingi hevur hesar viðmerking til viðmerkingarnar hjá FOÍB:

"Jarðfeingi metir ikki, at tað er munandi fíggjarlig byrða, um loyvishavarar hava umboðan í Føroyum. Hesir verða okkum kunnugt vanliga samsýntir eftir virkseminum, sum ikki er munandi. Jarðfeingi metir tað hava týdning, at myndugleikar og onnur kunnu koma í samband við loyvishavarar í Føroyum og ikki skulu leita uttanlands eftir hesum."